# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tørvur á útbúnum tíðindafólki

Seinastu dagarnar hevur nógv verið at hoyrt um herdu upptøkukrøvini til journalistútbúgvingina á Danmarks Journalisthøjskole. Reglan, sum veitti føroyingum, grønlendingum og íslendingum rættin til tvey pláss á skúlanum - har krøvini vóru heldur slakari, enn hjá umsøkjarum úr Danmark, er broytt soleiðis, at umsøkjarar úr Føroyum mugu lúka somu krøv, sum ein hvør umsøkjari úr Danmark.

Men hóast hetta afturstig, so kann kortini okkurt gott spyrjast burtur úr støðuni, tó at tað tykist løgið, at danir koyra føroyingar í ein pott saman við øðrum minnilum í tí eftir hondini multietniska samfelagnum, Danmark. Hóast tað kann ljóða rættvíst í donskum oyrum, so kann Danmark Journalisthøjskole bara útbúgva føroyingar - ella fólk sum duga føroyskt og skilja føroysk samfelagsviðurskifti - til føroyska miðlar. Aðrir næmingar av skúlanum kunnu eins illa starvast á einum føroyskum miðli, sum t. d. einum kinesiskum.

Men vit kunnu bara spyrja okkum sjálv, hvussu vit fáa tað besta burtur úr støðuni. Tað ber uttan iva til at gera eina kombinatión, har Fróðskaparsetrið og Danmarks Journalisthøjskoe gera eitt samstarv um eina føroyska miðlaútbúgving. Tann samfelagsigi og málsligi parturin kann takast í Føroyum, meðan lærarar av Journalistháskúlanum kundu undirvíst í tí journalistiska handverkinum - annaðhvørt í Føroyum ella í Danmark.

Ein slík millum loysn hevði uttan iva kunna fingið politiska undirtøku, og nú nýggjar lógir eru komnar fyri kringvarp og fjølmiðlaábyrgd, so er neyðut at skapa góðar karmar og hyggja inn í kjarnuna, tí okkum tørvar nógvar útbúnar journalistar í Føroyum - bæði á privatu og almennu miðlunum - men eisini í vinnulívinum annars, har útbúgvin fólk verða sett í starvs sum kunningarfólk.

**Sosialurin**

# Bøn er til stóra nyttu

**DÁNIAL Á DUL JACOBSEN**



Tá eg las greinina hjá Guttormi Djurhuus, rann mær í hug søgan um atheistin, sum var farin á veiðiferð. Ólukkutíð varð hann tikin á bóli av eini bjørn og hevði als ongar møguleikar at flýggja ella at skjóta bjørnina. Í neyðini gjørdi hann sum so mangur annar í dýrastu neyð, hann fór at biðja. Ájú, sanniliga hoyrdist ein rødd úr erva, sum segði:

»Hví kallar tú á Meg nú? Tú trýrt jú ikki, at Eg eri til!«.

Við hesum orðum klárnaði hjá atheistinum og hann mannaði seg upp og valdi at síggja vandan beint í eyguni. Men hvat? Deyðin var vísur, so í ítarstu neyð síni rópti hann enn einaferð:

»Gud, um tú ert til, kanst tú so ikki gera bjørnina kristna«.

Undrandi sær atheisturin, at bjørnin steðgar á, í tí hon skal høgga til, leggur labbarnar saman og fer at syngja: »Vit takka úti, vit takka heima...«

Skemt til síðis. Fríggjadagin 11. august hevur Guttormur Djurhuus eina grein í Sosialinum um, hvussu menningarlæran byrjaði, og um hvussu lættliga evulutiónin kann skapa eygu. Hon hevur, sum hann sigur, plenty of time, og vituligt - tað er jú bara tíð, sum skal til, og tá tú heilt sleppur undan at diskutera spurningin við nakran skapara ella designara, so er svarið líkamikið.

Fríggjadagin 18. august hevur Guttormur aftur eina grein, sum hesuferð leggur eftir bønini, og enn einaferð eru tað vísindi, sum stuðla niðurstøðuni, at bøn er til onga nyttu. Ein kanning, sum kemur til ta niðurstøðu, at tað ger verri at biðja. Siti við eini kanning um hjartatrupulleikar og bøn. Henda kanning verður umrødd í internetútgávuni hjá norska blaðnum VG tann 14.1.2000. Har verður millum annað sagt: "Bønn gjør alvorlig hjertesyke bedre, viser en vitenskapelig studie — selv når pasientene blir bedt for av fremmede, uten å vite om det selv. Pasientene som ble bedt for, opplevde færre komplikasjoner og fikk det i gjennomsnitt ti prosent bedre enn pasienter som ikke ble bedt for, konkluderer studien." Ein kanning og onnur. Hví ikki máta Atlantshavið við eini teskeið? Tað kundi veri áhugavert.

Sum av so mongum setur Guttormur Djurhuus eisini her vísindi fram sum alfa og omega, men tað er ein stór misskiljing. Vísindi eru í sjálvum sær bert amboð, sum kunnu hjálpa okkum at greina og fata umstøður og kringumstøður okkara. Sum onnur amboð kunnu vísindi brúkast bæði til gott og ilt. Tak til dømis knívin. Eitt amboð, sum einki húsarhald kann vera fyri uttan, men brúktur á skeivan hátt hevur knívurin kravt óteljandi mannalív. Mong eru tey, sum hava brúkt vísindi sum morðvápn. Vísindi, og tá serstakliga menningarlæran, eru av mongum brúkt sum knívur at drepa trúnna, men tað er og verður vónleyst. Tað hevur søgan tey seinastu hundrað árini so ruddiliga prógvað.

Var tað ikki fyri bøn, so var føroyska samfelagið ikki tað, tað er í dag. Vi kunnu bert fara nøkur fá ár aftur í tíðina, tá samfelagskreppan var upp á tað harðasta. Onkur, er hann nevndur, er hann kendur, spáddi tá, at tað fór at verða ógjørligt at stabilisera fólkatalið í Føroyum oman fyri tey 40 túsund. Vit máttu síggja veruleikan í eyguni, at tað fór ikki at bera til hjá Føroyum at bera fleiri enn 25 túsund tandur. Ja, og tað sá veruliga svart út. Spádómurin kundi lættliga verið gingin út, MEN BØN-IN vendi gongdini, so at vit í árunum, sum farin eru síðani, ongantíð hava verið fleiri fólk í Føroyum enn tað sama. Tá samfelagið lá í skeljasorli og fiskaloysi valdaði í fleiri ár, útlitini vóru av teim ringasta, tá sameintist tey í Føroyum, sum trúgva at bøn er til stóra nyttu, og uttan at nakar vísindamaður tá var førur fyri at greiða frá, hvat hendi, so vendist fiskaloysið til fiskiríkidømi. Restin er

# Strandferðslan vann á Tvøroyrar kommunu

**Landsrætturin hevur í dag dømt í málinum í ósemjuni millum Tvøroyrar kommunu og Strandferðsluna um havnagjald hjá Smyrli**

**RÆTTARMÁL**

Tvøroyar kommuna hevði kravt eitt munandi hægri havnargjald frá Strandferðsluni. Men Landsrætturin metti ikki, at grundgevingarnar hjá Tvøroyrar kommunu vóru haldgóðar og gav tí Strandferðsluni fult viðhald. Sostatt staðfesti Landsrætturin dómin í Føroya Rætti, sum eisini gav Strandferðsluni viðhald.

Strandferðslan sigur, at Tvøroyrar kommuna hevði kravt at havna- og brúgvagjaldið hjá Smyrli varð næstan trýfaldað. Hevði kommunan hevði fingið viðhald í Landsrættinum hevði hetta ført við sær, at Strandferðslan fekk eina eyka útreiðslu upp á einar níggju milliónir krónur til Tvøroyrar kommunu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.